Føroysku tunlarnir:

Lúrandi eldfellur

Hendir ein eldsbruni inni í einum av nógvu tunlunum í landinum, eru sløkkiliðini als ikki fyrireikað. At fremja bjargingararbeiði í einum brennandi tunli kevur serliga útgerð og serliga útbúgving, men hvørki finst í landinum, eins og eingin tilbúgvingarætlan fyriliggur fyri tunnilsvanlukkur. Tað er ikki so mikið sum avgjørt, hvør ið hevur ábyrgdina av tilbúgvingini.

VANLUKKUVANDI
Rúnar Reistrup

Alt ímeðan higartil longsti tunnil í Føroyum verður boraður, er trygdin í verandi tunnlunum út av lagi vánalig. Tunlarnir eru snøgt sagt tikkandi brandvanlukkur, ið bara bíða eftir at henda.

Einki sløkkilið í landinum hevur útgerð ella útbúgving til at fara inn í ein roykfyltan tunnil at fremja bjargingararbeiði. Og tí er tað ógvuliga avmarkað, hvussu nógv sløkkiliðini fáa hjálpt tann dagin ein samanstoytur hendir og eldur kemur í mitt inni í einum av longri tunlunum í landinum.

Ivi um ábyrgdina

Tað er sløkkiliðið í teirri kommununi, har tunnilin liggur, ið verður boðsent, um eldur kemur í inni í viðkomandi tunli.

Men kommunurnar hava bara skyldu til at hava sløkkilið, ið eru nóg væl mannað og útgjørd til at røkja tær »vanligu« uppgávurnar í kommununi, ikki serupgávur so sum tunnilseldar. Av tí sama hava smáar kommunur smá sløkkilið við ógvuliga avmarkaðari útgerð, ið als ikki er nøktandi til at fremja bjargingararbeiði í einum tunnilseldsbruna.

Hvør tað er, ið hevur skyldu at syrgja fyri røttu útgerðini og røttu útbúgvingini til at basa tunnilseldum, liggur ikki heilt greitt, tí lógin um eldsbruna tekur ikki hædd fyri slíkum sum tunnilseldum, og málið er ongantíð tikið upp.

Landið skal gjalda

Men sambært Brunaumsjón Landsins, er tað tó lítil ivi um, at tað eigur at vera uppgávan hjá tunnilseigaranum at syrgja fyri tilbúgvingini til tunnilin undir eigaravaldinum hjá hesum. Hetta er millum annað staðfest í Danmark, har landið til dømis brúkar 10 milliónir krónur um ári til tilbúgving í sambandi við tunnilin undir Stórabelt, eftir at tað varð staðfest, at tað er landið sum tunnilseigari, og ikki Korsør kommuna, har undirsjóvartunnilin kemur upp, ið hevur ábyrgdina av tilbúgvingini.

Føroya land er ígjøgnum Landsverkfrøðingin eigari av øllum tunlunum í landinum uttan Vágatunlinum, sum P/F Vágatunnilin eigur.

Tískil er tað sambært Brunaumsjón Landsins ikki uppgávan hjá einstøku kommununum, men hjá landinum sum tunnilseigara, at syrgja fyri tilbúgvingini til tunnilseldar, hóast tað er kommunala sløkkiliðið, ið verður boðsent. Hetta hevði verið ein nærum óberandi byrða fyri smærri kommunur, ið liggja soleiðis fyri, at tær hava ein tunnil innan fyri kommunumarkið.

Men hóast greiðu áskoðanina, hevur Brunaumsjón Landsins ikki fyrr enn nú tikið málið upp við tunnilseigararnar.

Sløkkiliðið í Kvívík

Eitt av kommunalu sløkkiliðunum í landinum, ið so at siga dag fyri dag fær ein størri tunnil sum part av sínum ábyrgdarøki, er sløkkiliðið í Kvívíkar kommunu.

So hvørt sum undirsjóvartunnlinum undir Vestmannasundi leingist, veksur tann ósvaraði spurningurin um trygdina í tunnlinum í sambandi við eldsbruna, bæði nú undir byggiarbeiðinum, og tá tunnilin verður tikin í nýtslu um hálvttriðja ár.

Byggirharrin, ið er NCC, hevur sambært P/F Vágatunlinum, ábyrgdina av at fólkið, ið arbeiðir í tunnlinum, hevur møguleika at basa smærri eldum og annars koma skjótt úr tunnlinum, um eldurin ikki kann basast. Men um ein vanlukka hendir og arbeiðsfólkið av einhvørjari orsøk ikki sleppur úr, verður ringt til alarmsentralin, ið sendir boðini víðari til sløkkiliðið í Kvívíkar kommunu.

Ongan kjans

Men kommunala sløkkiliðið í Kvívík hevur bert útgerð til vanligar eldsbrunar, og tí er ikki hugsingur um at sløkkiliðið kann fara inn í tunnilin at basa eldi.

– Sløkkiliðið hjá okkum er útgjørt til at basa smærri eldum, men tað hevur snøgt sagt ongan kjans at gera nakað, um tað verður boðsent til ein eldsbruna í Vágatunlinum. Og tað er heldur ikki hugsingur um at vit sum kommuna kunnu útgerða okkara sløkkilið til ein tunnilseldsbruna. Tað eru vit ov smáir til, sigur borgarstjórin í Kvívíkar kommunu, Heini Holm.

Sløkkiliðini kunnu altíð heita á sløkkilið í øðrum kommunum at koma sær til hjálpar, tá okkurt er á vási, og hevði Kvívíkar sløkkilið verið boðsent til ein eldsbruna í Vágatunnlinum, hevði hjálp verið tilkallað úr Havnini beinanvegin sigur borgarstjórin.

Men heldur ikki størsta sløkkilið í landinum er fært fyri at gera eitt nøktandi bjargingararbeiði um tað verður boðsent til ein tunnilseldsbruna.

– Vit hava spurt okkum fyri hjá sløkkiliðnum í Havn um hvussu tað er fyrireikað til ein tunnilseld, men tað vísir seg at tað hvørki hevur útgerð ella útbúgving til tunnilseldar. Vit fingu at vita frá Tórshavnar Sløkkiliði, at tað heilt einfalt ikki hevði farið inn í ein brennandi Vágatunnil, um talan var um ein umfatandi eldsbruna sigur Heini Holm.

> *– Vit hava spurt okkum fyri hjá sløkkiliðnum í Havn um hvussu tað er fyrireikað til ein tunnilseld, men tað vísir seg at tað hvørki hevur útgerð ella útbúgving til tunnilseldar. Vit fingu at vita frá Tórshavnar Sløkkiliði, at tað heilt einfalt ikki hevði farið inn í ein brennandi Vágatunnil.*

Meðan vit bíða

Enn hevur tað ongantíð verið ein eldsbruni inni í nøkrum av størru tunlunum í Føroyum. Men herfyri kom eldur í ein bil í leynatunlinum, og hóast hetta er ein av styttstu tunlunum í landinum, so upplivdi Tórshavnar Sløkkilið, ið varð boðsent at hjálpa Kvívíkar sløkkiliði, hvussu trupult tað er at gera bjargingararbeiði í einum roykfyltum tunli. Hendingin spældi tó væl av, og fólkini í tunlinum, vórðu fingin út.

Men tann hendingin er at meta sum lítið og einki afturímóti teimum vanlukkum, sum kunnu henda í størru tunlunum.

Tað er Brunaumsjón Landsins, ið skal halda eftirlit við, at millum annað tilbúgvingin í sambandi við tunlar er nøktandi. Men enn hevur Brunaumsjón Landsins bara havt fyrireikandi fund við P/F Vágaunnilin og Landsverkfrøðingin, ið eru einastu tunnilseigarar í landinum. Rættiligt hol er ikki sett á málið.

Brunaumsjónini vantar orku

Men sambært Petur Olsen, leiðara á Brunaumsjón Landsins, er tað ikki viljin, men arbeiðsorkan, ið vantar.

– Vit eru væl og virðiliga greið um, at tað stendur sera illa til við tilbúgvingini í sambandi við tunlarnar í landinum. Og tað nívir okkum almikið. Men Brunaumsjón Landsins vantar arbeiðsorku, tí sum nú er megna vit so at siga einans at halda eftirlit við, at nýbyggingar lúka krøvini um brunatrygd, og at ymiskir stovnar framhaldandi lúka krøvini. Alt sum eitur tilbúgving kemur í aðru rød. Vit eru tvey fólk á stovninum og okkum tørvar tvey fólk afturat, um vit skulu røkja okkara uppgávu. Sum nú er uppfylla vit bara ein lítlan part av lógini um eldsbruna, og tað er als ikki nøktandi, sigur Petur Olsen, leiðari á Brunaumsjón Landsins.

Hann sigur seg hava gjørt landsverkfrøðingin varugan við trupulleikarnar av væntandi arbeiðsorkuni, og hetta váttar landsverkfrøðingurin, men sigur, at sum er er eingin broyting í væntu.

Opið til Kl. 20⁰⁰
ÚTSØLAN
byrjar mánadagin kl. 8⁰⁰
Nakrir sjokkprísir!
Jakkar og Cowboybuksur:
fyrr upp til kr. 899,-
Mánadagin EINANS kr. 99,-
Klædningar • Jakkar • Buksur
Skjúrtur • Blusur • Troyggjur o.m.a.
JUNGMANN
Saltangará · Tlf. 44 81 10

ítróttur
Nr. 19 • leygardagur • 27. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Fult hondbóltsvikuskifti

Fyri fyrstu ferð í hálvan annan mánað er aftur full leikskrá í hondbóltskappingini, og millum annað verður ein sera týdningarmikil dystur leiktur í Vági

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at landslið og jólafrítíð hava gjørt sítt, verður nú av álvara lagt til brots í landskappingini hjá bæði monnum og kvinnum.

Brak í Vági

Størsti spenningurin í kvinnudeildini er uttan iva í Vági, har heimaliðið annan dagin á rað skal royna seg móti Stjørnuni. Liðini spæla eisini leygardagin, men tá er talan um fyrru hálvfinaluna í Coca-Cola kappingini.

Tað tykist undan dystinum greitt, at tað bert verður vinnarin av hesum, sum skal geara sær vónir um at fylgja við VÍF, og á heimaliðnum eru tær uttan iva sera uppsettar upp á at vinna annan landskappingardystin á rað móti Stjørnuni. Hinvegin kann tað hava sálarliga ávirkan á klaksvíksgenturnar, at tær longu hava tapt tríggjar dystir á rað. Tapa tær eisini dystin leygardagin, er hetta tal vaksið upp í fýra, og møguliga fimm eftir sunnudagin.

Í Havn skal Kyndil royna at fáa glið á móti Sóljuni, meðan VÍF á pappírinum er risa stórur favorittur móti Tjaldrinum.

Tað munnu menninir hjá vestmenningum eisini vera, tá teir somuleiðis fara til Runavíkar, meðan ein av nærmastu kappingarneytunum, StÍF, hevur dyst móti einum øðrum botnliði, nevnliga KÍF. Júst KÍF hevur ofta volt strandingum trupulleikar, so hóast mun á stigatalvuni, kann væl vísa seg, at hetta kann gerast ein áhugaverdur dystur.

Í Havn verður talan um lokaluppgerð, tá H71 og Kyndil bresta saman. Í útgangsstøði tykjast lokaluppgerðir altíð spennandi, og eftir at liðini vunnu hvør sin innanhýsis dyst í grundspælinum, er líkt til at alt kann henda í hesum dysti. Eisini hóast Kyndil á pappírinum átti at staðið seg betri.

Dystirnir um vikuskiftið verða allir leiktir sunnudagin, og eru teir hesir:

1. deild, kvinnur
Høllin í Vági:
VB-Stjørnan
Høllin á Hálsi:
Kyndil-Sóljan
Høllin í Runavík:
Tjaldur-VÍF

1. deild, menn
Høllin í Runavík:
Tjaldur-VÍF
Høllin í Vestmanna;
KÍF-StÍF
Høllin á Hálsi:
H71-Kyndil

Støðan, Meistaradeild Kvinnur

Støðan Lið	Dystir leiktir	vunnir	taptir	Sett vunnin	* tapt	munur	Stig
Dráttur	13	12	1	38	8	30	15
Mjølnir	12	11	1	34	7	27	13
Fleyr	13	6	7	20	27	-7	7
ÍF	12	4	8	15	27	-12	5
TB	12	4	8	22	25	-3	4
Fossánes	12	0	12	1	36	-35	0

Støðan, Meistaradeild Menn

Støðan Lið	Dystir leiktir	vunnir	Taptir	Sett vunnin	* tapt	munur	Stig
Mjølnir	9	8	1	26	9	17	9
ÍF	10	7	3	24	13	11	9
Fram	10	5	5	21	19	2	6
Fleyr	10	5	5	18	18	0	6
SÍ	11	0	11	3	33	-30	0

Oddastríð á Giljanesi

Ein partur av avgerðini um gullmerkini fellur ivaleyst á Giljanesi sunnudagin, tá oddaliðini í kvinnudeildini hittast

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Ein týðandi dystur hjá kvinnunum verður sunnudagin á Giljanesi kl. 16,00, tá oddaliðini og steypafinalistarnir Dráttur og Mjølnir møtast.

Dráttur skal nú prógva, at tær klára at standa ímóti trýstinum at liggja í oddinum, og at tær klára at vinna, tá tær eru favorittar.

Í landskappingini hava liðini higartil vunnið hvør sín dyst og vóru hesir sera spennandi. Báðir dystirnir endaðu 3-2, og líkt er til, at sama verður galdandi sunnudagin.

Jugoslavin Marina munurin

Í mun til seinasta ár, hevur Dráttur í ár leikandi venjara, sum er jugoslavin Marina. Hon er sera sterk í álopinum, meðan hon til tíðir ikki vísir eins gott spæl í verjuni. Men Dráttur hevur eisini aðrar góðar leikarar, sum t.d. landsliðsleikarar Helgu Nordendal og royndu Elisabeth Rasmussen. Hesar kunnu eisini vera avgerðandi leikarar, í einum so tættum dysti, sum roknast kann við sunnudagin.

Mjølnir altíð gott

Men mótstøðuliðið er ikki eitt tilvildarligt lið, og tað verður tað, sum kann blíva trupulleikin hjá Drátti. Við sínum góða grundspæli kann Mjølnir slíta eitthvørt lið upp, til tað ikki klárar at standa ímóti trýstinum longur.

Á liðnum eru royndir leikarar sum landslið-hevarin í fleiri ár Marjun Kalsø, Margit Joensen og Tina Jacobsen, umframt fleiri aðrar leikarar, sum altíð eru tilreiðar at stríðast til tað síðsta.

Um Dráttur skal vinna, verður uttan iva eisini neyðugt, at liðið fær góðan stuðul frá áskoðarunum.

Aðrir dystir

Hinir dystirnir í meistaradeildin verða hesir.

Gundadalshøllin
Fleyr–TB kl. 13.00
Kambsdalur
ÍF–Fossánes kl. 15.00

TB hevur hava stóra framgongd seinastu tíðina, og var m.a. í finaluni í NS-cup í Klaksvík, so her eru tvørágenturnar favorittar, meðan ein uttan iva kann rokna við at ÍF vinnur á Fossánesi, men alt kann tó henda, tí næst seinasta vikuskifti vann Fossánes sítt fyrsta sett í meistaradeildini.

Rok í Havnini

Havnarliðini bæði, Fleyr og Fram, hittast um vikuskiftið, og nógv bendir á, at talan kann gerast um ein sera spennandi dyst

FLOGBÓLTUR, MENN

So møtast teir aftur – Havnarliðini Fleyr og Fram. Dysturin verður leygardagin kl. 15,00 í Gundadalshøllini. Bæði liðini hava higartil leikt tveir dystir í endaumfarinum. Fleyr tapti 3-1 ímóti ÍF og vann 3-0 á SÍ, meðan Fram tapti 3-1 ímóti oddaliðnum Mjølnir og vann 3-1 á SÍ.

Stórur spenningur

Tað er stórur spenningur undan dystinum, tí bæði liðini liggja jøvn við 6 stigum í niðara helmingi á stigtalvuni, men hesir dystir vísa seg sum oftast at vera góðir kortini. Og eisini skal hugsast um, at liðini í ár eru sera jøvn. Tað eru bert 3 stig sum skilja ímillum topp og nr. 4, so her kann alt henda framvegis. Tað skal tó viðmerkjast, at Mjølnir hevur leikt ein dyst minni.

Rumeni skift síðu

Ein av leikarunum, sum í ár leikar við Fram er rumenin Pasco, sum seinasta ár vandi Fleyr, tá teir gjørdist føoyameistarar. Ein kann tí roknað við, at báðir partar vilja vísa, hvør tað var sum var orsøkin til føroyameistaraheitið.

Hjá Fram verður uttan iva avgerandi, um áleyparin og móttøkuleikarin Rúni Weihe fer at hava ein av sínum bestu døgum, og hvar á vøllinum Pasco fer at leika. Hann hevur higartil skift ímillum at vera hevari og áleypari.

Ein tídningarmikil partur verður eisini, um t.d. ungi Suni Petersen klárar at standa ímóti trýstinum í hesum avgerandi dystinum.

Fleyr royndirnar

Fleyr hevur fleiri royndar leikarar á liðnum. Nevnast kunnu Klæmint Isaksen, Johannes Ejdesgaard og Jan Hentze. Klæmint hevur higartil roynst væl, meðan Johannes Ejdesgaard hevur verið eitt sindur svingandi, men hevur í avgerðandi løtum leikt væl. Í mun til undanfarin ár leikar Jan Hentze bert som libero, og er sostatt ikki við í álopinum.

Eisini Fleyr hevur onkrar ungar leikarar. Steinar Eirikstoft hevur leikt fleiri góðar dystir, og serliga stuttligt var tað at síggja stikkbóltarnar, sum hevarin Jákup Villiam Sivertsen hegnisliga legði upp til hann ímóti ÍF.

Men hevarin hjá Fleyr fær ta størstu uppgávuna leygardagin. Tað verður hann, sum skal royna at býta bóltarnar út til áleypararnar hjá Fleyr, soleiðis at bóltarnir ikki enda í teimum høvu Fram-blokkunum.

Uttan iva ein spennandi og undirhaldandi dystur.

Steypavinnararnir til Sørvágs

Mjølnir skal leygardagin til Sørvágs at leika ímóti SÍ. Dysturin skuldi upprunaliga vera sunnudagin, men er vegna landsliðsvenjing fluttur til leygardagin kl. 13,30.

Mjølnir liggur á odda og hevur higartil ikki havt trupulleikar við SÍ, sum liggja niðast í meistaradeildini.

Avgerðandi hjá SÍ er tó, um teir hava allar menn tøkar, tí so kunnu teir gott stjala eitt sett ella meir.